DAGSINS MEINING

Fíggjarlógaruppskot

Landsstýrið hevur lagt sítt fíggjarlógaruppskot fram. Ikki kann sigast, at tølini eru tespilig. Fíggjarlógin vísir eitt hall upp á nærum 300 milliónir. Hallið er fyrst og fremst orsakað av fallandi inntøkum, meðan høga útreiðslustøðið verður varðveitt.

Tað er hugaligt at síggja, at vit nú hava fingið ein landstýrismann í fíggjarmálum,ið heilt greitt meldar út, at fíggjarlógirnar fyri komandi ár koma at verða ávirkaðar av fiskaprísum og búskparligu vánunum annars. Hetta hevur ikki verið greitt nokk í farnu árum, og gav tað at bíta, tá inntøkumetingarnar skramblaðu niður við heilt stórum milliónaupphæddum uppá fáar mánaðar, tí at man eftir øllum at døma hevði gloymt, hvussu føroyski búskapurin var skrúvaður saman.

Spurningurin við fíggjarlógaruppskotinum hjá landsstýrinum er tó, um man hevur gjørt tær raðfestingarnar á útreiðslusíðuni,ið skulu gerast. Tað tykist verða breið semja um, at útreiðslustøðið hjá landinum er ov høgt. Her verður hugsað um rakstrarútreiðslur og ikki um ílogur. Íløgutørvur er altið, og serliga er tað umráðandi at tað almenna varðveitir eitt ávíst íløgustøði, tá tíðirnar versna. Almenni raksturin er dýrur. Tað at blokkurin varð niðurskorin við 366 milliónum um árið ger, at tað neyvan slept undan sparingum í almenna rakstrinum. Verður tað illa dámt , so er at siga sum, at hetta er ein neyðug fylgja av blokkniðurskurðrinum. Sparingar nar eiga at vera sosialt javnvegaðar og raðfestast má við skili. Tí ber ikki til at fara at skera við einum ávísum prosenttali yvir ein kamb.

Kanska fer meir at síggjast í fíggjarlógini fyri næsta ár, tá hendan samgongan hevur havt veruliga tíð at lata sín politikk skína íguennum í fíggjarlógaruppskotinum.

Viðvíkjandi fíggjarlógaruppskoti, so er tað konstruktivt, at størsti andstøðuflokkur hevur lagt fram sítt egna fíggjarlógaruppskot. Hetta uppskot vísir eitt minni hall enn samgonguuppskotið, men trupulleikin er, at flokkurin hevur ein stóran trúvirðistrupulleika. Hvussu kann borgarin hava álit á, at eitt uppskot,ið hesin flokkur leggir fram í andstøðu, fer at halda, tá sami flokkur hevur havt medábýrgd av risastórum eykajáttanaruppskotum hvørt tað einasta ár í samgongu. Einki fíggjarlógaruppskot, ið var lagt fram av Karsten Hansen hevur hildið. Hvørt ár hava stórar milliónaupphæddir verið lagdar afturat útreiðslunum. Tí hava vit ilt við at trúgva, at ein flokkur, ið hevur undirbudgetterað kraftugt hvørt tað einasta ár, kann hava eitt uppskot í ár í andstøðu, ið er eftirfarandi. Tó má man vóna, at samgongulimir hyggja at uppskotinum hjá Tjóðveldisflokkinum og geva tí eina gjølla viðgerð, tí hvør veit, kanska okkurt gullkorn er. Vit fáa at síggja, hvussu leikur fer. Livst so spyrst.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Fleiri kvinnur møguleika at verða valdar í býráðið

Elin Lindenskov
býráðslimur
www.lindenskov.com

Kvinnufelagið í Havn hevur boðið til fundar at stovna ein kvinnulista at stilla upp til býráðsvalið í heyst.

Sum býráðslimur í Havn seinastu 12 árini fari eg staðiliga at heita á Kvinnufelagið at brúka sína orku til at ávirka politisku flokkarnar heldur enn til ein kvinnulista. Orsøkin er einføld: Fleiri kvinnur verða valdar á politisku listunum enn við einum kvinnulista!

Tvær ferðir í áttatiárunum stillaði ein kvinnulisti upp uttan úrslit. Hendir hetta aftur, skulu vit minnast til, at kvinnulistin tá bara tekur atkvøður frá kvinnunum á politisku listunum.

Tað er ein sannroynd, at vit eru nógv, sum hava gjørt eitt stórt arbeiði fyri at fáa kvinnum størri ávirkan í ymsu flokkunum. Tað hevur givið úrslit í býráðsarbeiðinum, hóast løgtingsvalið seinast var eitt afturstig.

Tað er eitt stórt og tungt stríð, sum nógvar kvinnur og menn hava gjørt í flokkunum fyri at vinna javnstøðuhugsjónini frama. Tað er sera týdningarmikið, at hetta arbeiði ikki fer fyri bakka.

Taka vit Tórshavnar Býráð í dag, so eru tríggjar kvinnur valdar í býráðið. Beate L. Samuelsen fyri Sambandsflokkin við 209 atkvøðum. Hildur Eyðunsdóttir fyri Tjóðveldisflokkin við 335 atkvøðum og undirritaða fyri Javnaðarflokkin við 392 atkvøðum. Trý tey seinastu valskeiðini hevur Javnaðarflokkurin verið umboðaður við einari kvinnu og einum manni. Tvey tey næstu á listanum hjá Javnaðarflokkinum eru eisini kvinnur.

Møguleikar eru fyri at nógvar kvinnur kunnu verða valdar í býráðið á valinum í ár.

Fólkaflokkurin hevur fyrr havt kvinnu í býráðnum. Taka vit løgtingsvalið, so var Annika Olsen nummar fýra á listanum við 152 atkvøðum. Stillar hon upp í heyst hevur hon óivað ein kjans. Fólkaflokkurin hevur fýra umboð í býráðnum.

Beate L. Samuelsen í Sambandsflokkin kann væntast at verða afturvald.

Nú Tórfinn Smith fór úr Javnaðarflokkinum í býráðnum, eru trý tey fremstu valevnini á Javnaðarlistanum kvinnur. Elin Lindenskov 392 atkvøður, Rigmor Dam 188 atkvøður og Meta Palle 111 atkvøður. Tilsamans høvdu allar 5 kvinnurnar á Javnaðarlistanum 769 atkvøður.

Sjálvstýrisflokkurin hevur boðað frá, at hann fer at stilla eins nógvar kvinnur og menn upp til valini. Kemur Sjálvstýrisflokkurin aftur í býráðið, er Malan Johansen sjálvskrivað toppvalevni.

Fyri Tjóðveldisflokkin er Hildur Eyðunsdóttir í býráðnum. Hon kann sjálvandi eisini væntast afturvald.

Miðflokkurin hevur ikki umboðan í býráðnum. Men Jenis av Rana hevur verið valdur í býráðið. Hann kann sjálvsagt afturveljast, men meðan hann er løgtingsmaður og kommunulækni hevur hann valla stundir at sita har. Varaumboð hjá honum á tingi er Charlotta á Váli Olsen.

Um kvinnur arbeiða konstruktivt kunnu vit fáa eitt nýtt býráð, sum hevur meiriluta av kvinnum - har t. d. 7 av teimum 13 býráðslimunum eru kvinnur.

Stillar ein kvinnulisti upp, minka hesir møguleikar munandi. Seinast kostaði hvørt umboð í býráðnum 723 atkvøður. Um vit nýta løgtingsvalið í ár sum grundarlag er talið 1.042. Vanliga er vallutøkan lægri til býráðsval.

Mín greiða fatan er, at ein kvinnulisti fer at órógva nógv í øllum flokkum - og taka møguleikan frá fleiri kvinnum at verða valdar. Eg skal ikki siga, at ein slíkur listi ongan kjans hevur at fáa umboð valt, men hann fær valla fleiri umboð.

Míni ráð til kvinnurnar í Kvinnufelagnum er heldur at stuðla kvinnum á teimum politisku listunum. Tað er einasti máti at fáa eitt javnari býti millum kynini.

Á páskum

Frelsari vár,
tey bløðandi sár,
á krossi Hann hekk,
Hann tók syndina vekk.

Hann segði har,
tað fullgjørt var,
Hann gav upp ond
í Harrans hond.

Av grøvini upprisin Hann,
sum sigur yvir deyðan vann,
í himnabúð jú Hann er har,
øll skuld er goldin tær og mær.

Og kæri Jesus, eg takki tær,
fyri lívi títt,ið tú gavst mær,
eitt pláss til reiðar tú mær ger,
til eg fari úr hesi verð.

Olaf F. Berg

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eydun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard ave@post.olivant.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstaðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-friggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Stærri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Friggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Stærri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Hendrik Old sveik Suðuroynna

Hergeir Nielsen

Fyri einum ári síðan samtyktu vit eitt uppskot frá Javnaðarflokkinum um, »hvussu størv (ársverk) og heimildir, og møguligir partar av almennari umsiting og nýggjar umsitingar kundu flytast til útjaðaran.«

Frásæð einum avgjørdum miðstaðarmanni, sum atkvøddi blankt, samtykti løgtingið við 29 atkvøðum at gera eina roynd at flyta út í útjaðaran almenn størv og umsitingar.

Einki ávíst innihald var í hesum uppskoti frá javnaðarflokkinum, sum tá sat í andstøðu, og einki víðari spurdist burturúr tí heldur.

Hesum partinum hava vit bjarga í land við uppskotinum um at flyta ein part av strandafaraskipum landsins til Suðuroyar, soleiðis at suðringar sleppa at umsita teirra egnu viðurskifti.

Nú situr javnaðarflokkurin innafyri í samgongu, og hevur ríkiligar møguleikar fyri at fáa kjøt á sítt egna mál, sum nærum eitt samt løgting samtykti.

Varamaðurin hjá Sverra Midjord trokaði seg inn á formanssessin í vinnunevndini, og fekk her teir optimalu møguleikarnar fyri at viðgera hetta uppskot okkara. Men gakk.

Hann vísti tí frá sær, og hirdi tí ikki eina sømuliga viðger. Sum nevndarformaður í vinnunevndini hevði hann allar møguleikarfyri at fylgja upp løgtingsins vilja í sínum egna máli, men hann sveik.

Har vit aðrir stóu sum menn, og samtyktu uppskot javnaðarfloksins í andstøðu, sveik Hendrik Old so dyggiliga møguleikarnar fyri at fylgja málinum víðari, nú høvi beyðst í samgongu.

Strandferðslan hevur á fundi við vinnunevndina greitt frá, at ikki ber til at órógva kongaríkið teirra. Heildaratlit hvørva og dupultfunktiónir koma í staðin fyri sigur hesin stovnur sjálvandi, eins og allir aðrir stovnar vildu gjørt, skuldi teir verið spurdir líknandi spurningar.

Og so - Gud hjálpi tú okkum - sigur formaðurin í vinnunevndini nú í álitinum, at fjarstøðan úr Suðuroynni fer at darva munandi dagliga samskiftið og samstarvið hjá SL, og alt gerst nógv truplari og kostnaðarmiklari.

Formaðurin í vinnunevndini kýkar rátt tí,ið hesin almenni stovnur borðreiðir við, og slær við hesum grundgevingum ein sjeytummaseym gjøgnum allar møguleikar fyri at flyta nakað sum helst út um bøgarðarnar hjá sær sjálvum.

Í undanfarnu samgongu sat ein suðringur, og søguliga stór tøk vóru tikin fyri Suðuroynna. Eisini var hann við til at samtykkja uppskot javnaðarfloksins, sum í dag vísir seg at hava verið sett fram upp á hvamsvís.

Hendan samgongan yðjur í suðringum, og áhugavert verður at síggja, um allir fara at roynast eins kaldir mótvegis oynni, sum formaðurin í vinnunevndini tykist gera.

Ein seinasta vón er, at Sverri Midjord tekur í herðatoppin á varðamanni sínum, og sigur honum, at Tvøroyri hevur eitt náttúrligt krav upp á at umsita stórsta skipið í flotanum, sum enntá ber býarmerkið hansara á hekkuni.

Konstruktivur interferensur

Páll Poulsen

Í greinini "Fortíðin kemur ikki av sær sjálvari" skrivaði Páll Poulsen um konstruktivan interferens. Søguáhugaði fólk hava spurt um nøkur dømi. Her er eitt klokkuklárt dømi..

Í 10 kapittul skrivar Andras Mortensen í Hinum Føroyska Róðrarbátinum

Bátsband. (Undirstrikingar, framhevjan, viðm. í parentes PP).

"Tann beinleiðis orsøkin til, at løgskipanin um einahandil varð avtikin í 1856, var, at hon gekk ímóti § 88 í nýggju donsku grundlógini frá 1849, sum segði, at "alle indskrænkninger i den frie og lige Adgang til Erhverv, som ikke ere begrundede i det almene Vel, skulle hæves ved Lov". Nýggju ár seinni, í 1865, varð ein onnur løgskipan í Føroyum avtikin við somu grundgeving, nevniliga ein skipan,ið snúði seg um bátahald. Hon varð av summum rópt "bátsbandið" og øðrum "bátshandil". Í hesum kapitli skal verða kannað, hvat keldutilfarið í sambandi við hesa skipan sigur okkum um gongdina í føroyskum bátahaldi í tíðini fram til avtøkuna av hesi løgskipan og sosialum viðurskiftum í tí sambandi.

Skipanin um bátsband var ongantíð fest á blað, men virkaði í rættarskipanini sum óskrivað lóg. Mong dømi eru um slíkar lógir í rættarsamfeløgum í Norðurlondum í eldri tíð, men í granskingarligum høpi hevur higartil verið lítið gáað um tær, netupp tí tær ikki finnast skrivaðar í lógarteksti, men einans av mótsetningur kemur fram. Talan er helst um praksis og hevd).

Tann nágreiniligasta heimildin um skipanina um bátsband eru viðmerkingarnar til lógina frá 1865, sum tók hana av, og í innganginum til tær verður greitt soleiðis frá henni:

"Fra gammel Tid paahviler der visse færøske Jordejendommes Besiddere Forpligtelse til at holde store Fiskerbaade og andre af Færøernes Indbyggere Forpligtelse til at gøre Tjeneste paa disse Baade. Om dette Forhold haves der ingen Lovbestemmelser, naar undtages den ved Plakaten af 23. Marts 1813 bekendtgjorte kongelige Resolution av 13 . s . om, at Sager angaaende Rettigheden til at bygge og holde Fiskerbaade paa Færøerne skulle som Politisager paakendes af hvert Steds Sysselmand, samt at Sysselmændenes Kendelser, naar Parterne ej ville akkviescere ved samme, skulde indankes for Amtmanden, og af ham uden videre Appel paakendes; men i øvrigt er Forholdet ordnet ad Sædvanens vej."

Soleiðis skrivar Andras Mortensen í "Sjómentum", um hin føroyska bátin. Hann fekk bæði Phd. og M.A. Jacobsens heiðursløn fyri bókina, sum kostar fýra hundrað krónur. Tað hann ikki skilur er at lógir kunnu vera lógir, (grundlógin er lýst í Føroyum sum ein vanlig lóg í 1850), men tað sum jura eisini gongur út uppá er: "Hvat ger man". T.d. ber til í dómi at ganga ímóti lógarteksti, um tekturin er avoldaður ella umhandlaðu viðurskiftini eru av sovorðnum slag, at tey umrøðu í øðrum keldum, eitt nú rættarúrskurðum, ið eru varðveittir skrivliga, og í søgn. (Einki dømi nevnt).

Við lógartekstum er tað annars soleiðis í søgufrøðiligum høpi, at teir ikki treytaleyst kunnu metast sum keldur til verulig søgulig viðurskifti av teirri einafaldu orsøk, at soleiðis sum lógin er til skjals, er hon fyrst og fremst at meta sum ein normur, ið lóggevarin vildi skuldi ganga í framtíðini.

Um normurin veruliga varð hildin, sæst ikki úr lógartekstinum sjálvum. Við teimum óskrivaðu lógunum er øðrvísi, tí tær vóru úrslit av og vóru til við siðvenju. (Inkongruens) So frægt sum til ber at staðfesta innihaldið í teimum, má tí metast, at tær endurspegla viðurskiftini, sum tey veruliga vóru, (Inkongruens) og ikki einans normin, ið lóggevarin vildi hava settan í gildi (Hvussu setur man ein norm í gildi?). Tær óskrivaðu lógirnar, sum virkaðu í rættarskipanini, kunnu tí sum mótsetningur til tær skrivaðu lógirnar frá kongi eyðmerkjast sum fólksligar lógir. (Diffust, eingin definitión, her stendur heldur ikki hvussu hesin ikki eru hóskandi longur. §88 verður heldur ikki funktionelt defineraður í mun til samtíðina.

Andras heldur seg hava "gefundenes gefressen" í hesum, men hann er ikki á leið. Tí Kongaligi Grønlendski Handilin KGH skuldi verið avtikin, um hatta passaði. Stovnaður í 1774-75.

"Í grundlógini frá 1953 sæst sami tekstur í § 74. Alle indskrænkninger i den fri og lige adgang til erhverv, som ikke er begrundede i det almene vel, skal hæves ved lov." Logiskt sætt skuldi Kgl. Grønlendski Handilin KGH verið niðurlagdur í seinasta lagi 1953 av somu orsøk, tað bleiv hann heldur ikki ta ferðina. Hann er har enn tann dagin í dag, tó í øðrum líki.

Sjálv orðingin "visse færøske Jordejendommes Besiddere" vísir at hendan skipan ikki hevur verið galdandi í øllum bygdum. Sjálvt tíðarintervallið millum avtøku einahandilsins og bátsbandsins eigur ikki at vera undirmett og vitan teirra lógkønu tá á døgum. T.d. tekur hann hendingina við avtøku bátsbandsins og speglar hennara præcedens aftureftir til 1855. Tað ber ikki til, præcedens gongur altíð frameftir tíðarlinjuni. (Akkurát sum søgan kronologiskt). Logiski konsekvensurin í hesum páhaldinum er at grundlógin framhaldandi bleiv brotin aftaná 1850, fram til 1865. Hetta er heldur ikki nevnt, júst tí talan er um konstruktivan interferens. Pástandurin blívur ikki sannari av at Andras Mortensen nevnir hetta fleiri ferðir í bókini, heldur øvugt fer hetta at vísa eftirtíðini at hann ikki arbeiðir á søguvísindaligum grundarlagi. Kanska fáa vit einaferð eina søgudeild, hvørs aðalmál verður at reksa hesar fløkjur sundur aftur?

Hans J. Debes sigur í Føroya Søgu soleiðis:

"Bátsbandið mátti koma í stríð við fríhandils- og vinnufrælsishugsjónir, so hvørt sum tær mentust í 19. Øld, serliga eftir at kongligi einahandilin var avtikin: Níggju ár eftir at fríhandilin var komin, og sjey ár áðrenn skipsfiskiskapurin byrjaði, fór so í 1865 við lóg úr gildi "Den forpligtelse, der hidtil harpaahvilet en del færøske jordejendommes besiddere til at holde baade og visse af Færøernes indbyggere til at gøre tjeneste paa bemeldte baade".

Amtmaðurin hevði í 1864 mælt til, at skipanin varð tikin av. Hann hevði nevnt, at nógv klandur og sakarmál stóðust av henni, at hon vinnuliga var vorðin ein kleppur, og at hon tók frá fólki persónlig rættindi, sum Grundlógin frá 1849 annars tryggjaði.

Sambært Norsku Lóg skuldi yvirvaldið seta ávísar menn "som baade til lands og til vands skal forskaffe den "som baade til lands og til vands skal forskaffe den rejsende fordringskab". Í oyggjalandi sum Føroyum má hava verið serliga neyðugt við onkrari skipan at flyta fólk um fjørð og sund. Henda skipanin varð nevnd skjútsur., men skyldan fall ójavnt bæði á menn og bygdir. Ein skjútsskaffari í hvørjari bygd hevði ábyrgdina av flutningi, í Suðuroy kallaðust teir, ið tilnevndu skjútsmenninar, nevnarar."(Debes: Føroya Søga Bind 3 síða 197.)

Her byggir Debes á kelduútsøgnina, tað er eitt skúladømi um hvussu søga skal skrivast. Hetta er á høgum stigi. Lat okkum heldur ikki gloyma at Amtmaðurin tulkar tekstin, sum stendur í Grundlógini frá 1849.

NB: Í Fróðskaparriti nr 41 bls 5. stendur soleiðis skrivað:"Í viðmerkingunum til fólkatingslógina verður eisini nomið við, hví bátsbandsskipanin varð tikin til viðgerðar og tikin av við lóg. Skipanin var ein forðing fyri frælsari menning af føroyksum vinnulívi, sum hevði fingið nýggjar fyritreytir, tá kongaliga einahandilsskipanin varð tikin av í 1856. Og hon gekk ímóti § 88 í grundlógini frá 1849, sum segði, at "alle Indskrænkninger i den frie og lige Adgang til Erhverv, som ikke ere begrundede i det almene Vel, skulle hæves ved Lov". Soleiðis ber ikki til at skriva.

Keldur: Fróðskaparrit
41.bók 1993, Síða 5-6
Andras Mortensen, Hin føroyski róðrarbátur-Sjómentir føroyinga í eldri tíð
Opponentar: Bjarne Stoklund, Arne Emil Kristensen og J.H.W. Poulsen
Annales Societatis Scientarium Færoensis Supplementum XXVI Síða 217-220.
H.J. Debes: Føroya Søga Bind 3 Anno 2000